EUROPA CUP
**DYSTARSKRÁ 3 / 2022**

# H71

LEYGARDAG/SUNNUDAG
**3.- 4. DESEMBER**



# EUROPA CUP:

**KVINNUR: Leygardagin 3. desember**

## KL.19.00: H71- Slavia Praha

**KVINNUR: Sunnudagin 4. desember**

## KL.19.00: Slavia Praha - H71


sms
SUÐUROYAR SPARIKASSI
ARTICON
WENZEL.FO
BÓNUS
INTERSPORT Thomas Dam Ítróttur
BYGMA BALSLEV
TRYGD
ADVOKATFELAGIÐ



Anna Dam, forkvinna í H71

ANNA DAM, FORKVINNA Í H71

# VÆLKOMIN TIL EHF BRAK

Tað er ikki sørt við stoltleika, men eisini eyðmjúkleika, at eg sum forkvinna í H71 kann bjóða tykkum vælkomin til EHF Europa Cup-dyst í ítróttarhøllini á Hálsi, nú H71-kvinnurnar í triðja umfarið í altjóða kapping taka ímóti tjekkiska liðnum Slavia Praha.

Vit hava frammanundan leikt okkum víðari við greiðum sigrum á útivølli í eysturríska býðnum Ferlach yvir Sc Witasak Ferlach.

Eingin ivi er tó um, at vit nú, vit eru komin til triðja umfar, fara at møta harðari mótstøðu. Skulu vit gera okkum vón um at spæla okkum víðari, so má avrikið á vøllinum liggja oman fyri tað vanliga. Slíkt gerst bert, um karmar og fyrireiking er í lagi, so nú vóna vit, at vit megnað at skapa ein veruligan heimavøll, ið kann geva okkara kvinnum eyka orku.

Kvinnurnar hjá okkum hava víst at tær eru gjørdar úr serligu tilfari og vit kunnu bara staðfesta, at tað er bara við at seta sær mál, ið heldur eru í hægra lagi, at vit kunnu koma longur fram á leið.

Vit vita eisini, at megnar H71 at fáa tveir dystir aftrat í hesi kappingini, so er tað ikki bara ein ítróttarlig avbjóðing, men eisini ein fíggjarlig. Tíbetur hava

okkara stuðlar verið óførir at laga seg eftir hesum umstøðunum, umframt at fleiri privatpersónar hava lagt nógv fyri, so bæði okkara mans- og kvinnulið er sloppið út í Europa at umboða H71 og okkum øll so væl.

Leygardagin verður stóra stuðlatiltakið “ Súkkla fyri Europa” endurtikið og vit eru sera spent at síggja hvussu tað ferð at ganga hesuferð. Vit eru eisini stolt og takksom yvir, at so nógv fólk bæði í felagnum, men ikki minst uttanfyri felagið, leggja so nógv fyri, at stuðla okkara luttøku. Stóra tøkk skulu tit øll hava fyri tað!

Anna Dam

G.G. Tit, ið av onkrari orsøk ikki kunnu ella ikki halda tykkum til at fara í høllina, kunnu keypa dystin hjá kvinnunum á hsf.fo/live.




WENZEL
FORD, VOLVO OG MAZDA Í FØROYUM
WENZEL.FO
Akranesgøta 5 · Tórshavn · tel. 35 45 00
WENZEL.FO


BANKNORDIK
Áhaldni gevur úrslit
Errin høvuðsstuðul hjá føroyskum hondbólti
Meira enn ein banki

# TÁ RÆTT SKAL VERA RÆTT



ADVOKATSKRIVSTOVAN

Fríða Patursson, adv.
Óla Jákup Kristoffersen, adv.
Christian Andreasen, adv.
Niels Winther Poulsen, adv.
Helga á Borg, adv.
Rósing Rasmussen, adv.
Kristoffur Kristoffersen, adv.ft.

FRÚUTRØÐ 4 · POSTBOKS 6 · FO-110 TÓRSHAVN
TELEFON: (298) 35 33 35 · TELEFAX: (298) 35 33 36 · WWW.JURA.FO




sms · VÓNIN · SUÐUROYAR SPARIKASSI · WENZEL.FO · BÓNUS · INTERSPORT · BYGMA BALSLEV · TRYGD · ARTICON



PETUR EVEN DJURHUUS / ODDAGREIN

# RISA AVBJÓLÐING

*Petur Even Djurhuus hevur verið í felagnum frá fyrsta degi.*

So er triði faldarin hjá H71 í ár á gøtuni og enn einaferð brynja kvinnur okkara seg til dystir í EHF Europa Cup kappingini fyri 2022/23. Fyrsta umfar sítt vunnu tær leikandi lætt ímóti sveisiska liðinum SC Ferlack við málmuninum 59 – 43 fyri tveir dystir á útivølli. Hesaferð stendur stórliðið SLAVIA PRAG úr Tjekkia fyri skotum og vera báðir dystir hetta vikuskiftið leiktir í ítróttarhøllini á Hálsi í Havn. Fyrri leygarkvøldið 3. desember 2022 kl. 1900 og hin seinri sunnukvøldið 4. desember kl.19.00 2022. At mótstøðan til hesar dystir verður munandi harðari enn til fyrra umfarið, er einki at ivast í, so nógv skal vera lagt fyri, um vit skulu knógva mótstøðu liðinum á hesum sinni.

Annars hava menninir eisini luttikið í EHF Europa Cup í ár, men spældi ikki so væl av hjá teimum. Teir taptu báðar dystirnar á útivølli í Beograd, tó so, at vit vóru væl við í báðum dystum og um leikarar okkara vóru neyvari í avgerandi løtunum, so kundu vit væl haft koppa mótstøðuni. Havandi í huga, at vit eru í holt við at menna ein nýggjan hóp og at kalla bert ungir nýggir leikarar luttóku í dystunum í Beograd, so er avrik teirra avgjørt góðkent.

Annars er heilt óveruligt fyri ein gamlan H71 – ara, ið hevur verið við í felagnum frá fyrsta degi, soleiðis at sita og royna

at seta orð saman til leikarafaldara felagsins til Europa Cup dystir hjá H71. Tankarnir leita ofta slíkar løtur aftur til fyrstu trilvandi byrjanina innan hondbólt í H71 úti á asfalt leikvøllum og inni í hallum kring landið mitt í 70 – unum. Venjarar vóru vit sjálvir, leikbúnar høvdu vit savna saman sjálvir og áttu persónliga, sama við bóltunum. Líka mikið, hugagóðir vóru vit, hóast stórtap í at kalla øllum dystum fyrstu árini. Men tak H71 nú, har bæði fremstu liðini hjá kvinnum og monnum hava vunnið FM og luttaka í kappingum úti í heimi triðja ár á rað. Ein einastandandi og dreymakend ferð úr botninum og upp á heimligu hondbóltstindarnar.

Men einki kemur av ongum. Nógvar og hugagóðar kreftir eru seinastu 20 árini lagdar í at menna felagið til tað felagið er í dag. Og skal framburður og menning framhaldandi vera - ja, skal bara verið hildið stand – so er neyðugt at allar hesar kreftir í felagnum arbeiða saman um at bera felagið áfram. Eitthvørt drál og afturstig, kann skjótt taka broddin av tí arbeiðshugi, sum so nógvar kreftir í Hoyvík hvønn dag leggja í felagið, ein arbeiðs- og virkishugur, ið er alt avgerandi fyri at H71 kann arbeiða fyri at varðveita sessin í broddi fylkingar innan hondbólt her á landi.

Við hesum orðum vil eg ynskja øllum H71 – viðhaldsfólki og øllum hondbóltsáhugaðum føroyingum eitt gott hondbóltsvikuskifti, har H71 kvinnurnar vónandi standa eftir sigursælar, tá dystirnir eru loknir.



*H71 kvinnur í Europa Cup dysti.*

NORÐOYA
SPARIKASSI

# Gröntbústaðarlán

Hevur tú bústað við grønari orkuskipan, t.d. jarðhita, fjarhita ella hitapumpu, er Grøna bústaðarlánið ein góð og bílig loysn.

Við Grøna bústaðarláninum fært tú lægri rentu. Tú kanst leggja títt vanliga Bústaðarlán um til eitt Grønt bústaðarlán, um bústaðurin hevur grøna orkuskipan.

Lánið hevur broytiliga rentu og fasta afturgjaldstíð.

Les meira á ns.fo.

Norðoya Sparikassi
Hoyvíksvegur 67
FO-100 Tórshavn
Tel. +298 475000
ns@ns.fo
ns.fo


















DESIGNA KØKAR BORG | RUNAVÍK | KLAKSVÍK | TÓRSHAVN | WWW.BORG.FO


Vit raka málið!


Tað besta omaná
Forkela familjuna. Royn okkara
leskiliga vaniljukrem.
VANILJU
KREM
Nýggj vøra!

fk




LM ELECTRIC - 100 TÓRSHAVN - HOYVÍKSVEGUR 53
TEL 35 12 20 - WWW.LM.FO - LM@LM.FO

Pf. Jógvan Weihe

P/F Jógvan Weihe | Tel: 35 38 97 | Fax: 35 38 98
www.weihe.fo | weihe@weihe.fo



## INGI OLSEN

# H71 Í EUROPA

*Ingi Olsen var í fjørð høvuðsvenjarai hjá okkara H71 kvinnum saman við Mark Lausen Marcher. Mynd: Álvur Haraldsen*

Felagið úr Hoyvíkini hevur nú í nøkur ár verið flaggskipið, tá tað umræður hondbólt í Føroyum. Útmeldingin seinastu árini hevur verið, at umframt at spæla í heimligu kappingunum, so verður eisini spælt í Europa. Seinasta ár gjørdi serliga kvinnuliðið eitt ordiligt hol í sjógvin í hesi kappingini. Og tað skuldi meira enn bara eitt mótstøðulið til at steðga liðinum.
Tað skuldi – spyrt tú meg – ein ógvuliga ivasom avgerð uttanfyri vøllin til, tikin av EHF, til at steðga kvinnunum úr Hoyvík. Áðrenn kríggi í Ukraina høvdu fleiri lið úr stórum hondbólts tjóðum fingið oyruni í hondbólts maskinuna hjá H71. Og øll við sama úrslitið. H71 vann allar dystirnar rættuliga samførandi. Men seint í februar seinasta ár brast so kríggj á í Ukraina og tað søguna kenna vit alt ov væl til. H71 bleiv varpa úr kappingini, hóast tað, at onnur lið við somu fortreytum, kundu halda fram í kappingini. Og har endaði so tann søgan.
Kvinnurnar hjá H71 hava til hetta kappingarárið klára at manna nøkulunda sama lið. Eitt sera ungt lið, men samstundis eitt lið við nokk so nógvari rutinu eftir hondini. Fleiri leikarar hava týdningarmiklar uppgávur á m.a. A-landsliðinum. Og hetta kemur liðinum tilgóðar, nú liðini í Europa standa fyri framan. Tá spælt verður hesar EC dystir er nokk so

avmarkað, hvussu væl ein kann fyrireika seg til dystirnar. Tí krevur tað nógv av sálarligari orku, umframt tað kropsligu orkuna, sum sjálvandi eisini skal til. Tað hevur rættuliga stóran týdning, at ALLIR leikararnir taka sína uppgávu í allar størsta álvara. Og gera teir tað – og tað sóu vit seinasta ár – ja so eru kvinnurnar úr Hoyvík sterkari enn flestu liðini í Europa í kappingini sum vit luttaka í. Og tað er ikki bara nakað sum er komið av sær sjálvum. Fyri at koma hartil, hevur øll manningini vant hart og miðvíst í fleiri ár. Og hørð venjing gevur úrslit.
Tí er tað ikki so yvirraskandi, at kvinnurnar vunnu nokk so lættliga í fyrstu royndini í ár. Leygardagin er ein stór og spennandi uppgáva fyri framan og tað er mín vón, at nógv fólk møtir upp til dystirnar. Eg væenti, at kvinnurnar hjá H71 aftur hesuferð fara at seta hol í sjógvin og koma at standa sum samlaðir vinnarar – enn einaferð.
Góðu úrslitini hjá H71 hava eisini haft tað við sær, at fleiri og fleiri lið runt um í londunum rundan um okkum fylgja við leikarunum. Og tað skuldi ikki undra meg, um vit í næstum fáa fleiri av okkara leikarum til stór feløg í Europa. Longu nú vita vit, at Jana Mittún fer til Viborg at spæla. Spennandi verður at fylgja – tað er heilt víst.
Koyr á H71 – vit eru stolt at tykkum!





1 Rúna Jógvansdóttir Larsen
2 Elsa Egholm
4 Brynhild Pálsdóttir
5 Vár Bentsdóttir Zachariasen
6 Bjørk Brimnes
7 Maria Halsdóttir Weyhe
8 Karin Egholm
9 Marita Mortensen
11 Lukka Arge
12 Alda av Skarði
13 Inga Maria Joensen
14 Sunniva Bogadóttir
15 Christina Turiðardóttir Arge
17 Lív Bentsdóttir Zachariasen
25 Sára Jacobsen
27 Anna Elisabeth Halsdóttir Weyhe
29 Poula Fríðheim Petersen
77 Jana Mittún
99 Guðrið Bogadóttir á Borg

**Venjari:** Benjamin R. Christiansen
**Hjálparvenjari:** Jon Arne Kamsvåg
**Liðleiðari:** Beinta Lindberg Hansen
**Málmansvenjari:** Alexander Lein Martinsen
**Fysiskur venjari:** Heri Ziska
**Fysioterapeut:** Sebastian Christiansen / Ingilín Holm

## SMS KAPPINGIN - KVINNUR

| Nr.: | Lið: | Dystir | V.M | T.M | Munur | Stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **1.** | **H71** | **8** | **279** | **187** | **92** | **15** |
| 2. | Kyndil | 8 | 251 | 182 | 69 | 13 |
| 3. | Neistin | 8 | 216 | 170 | 46 | 12 |
| 4. | stjørnan | 8 | 247 | 214 | 33 | 12 |
| 5. | Víf | 8 | 206 | 232 | -26 | 6 |
| 6. | VB | 8 | 157 | 222 | -65 | 3 |
| 7. | Stíf | 8 | 178 | 244 | -66 | 3 |
| 8. | EB | 8 | 178 | 261 | -83 | 0 |



| | |
|---|---|
| 1 | Torstein Sivertsen |
| 2 | Sveinur Olafsson |
| 5 | Rói Seyer Hjaltason |
| 7 | Baldur Gillason |
| 8 | Tórmóður Petursson Djurhuus |
| 9 | Jón Rói Mohr Høgnesen |
| 10 | John Skaalum Vilhelm |
| 15 | Ragnar Karlsson |
| 18 | Sakir Tróndarson Frýdal |
| 21 | Høgni Højsted |
| 23 | Ári Rúnason |
| 28 | Rói Ellefsen á Skipagøtu |
| 31 | Rói Heinason Thomsen |
| 39 | Rókur Ziskason |
| 45 | Peter Krogh |
| 50 | Alexander Lein Martinsen |
| 71 | Bogi Hansen |

**Venjari:** Simon Olsen
**Hjalparvenjari:** Djóni Gaard Joensen
**Málmansvenjari:** Ári Dam
**Fysiskur venjari:** Heri Ziska
**Fysioterapeut:** Sebastian Christiansen
**Liðleiðari:** Petur O.Sivertsen / Hanus Mortensen

BURN FITNESS

## BURN KAPPINGIN - MENN

| Nr.: | Lið: | Dystir | V.M | T.M | Munur | Stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1. | Kíf | 8 | 239 | 217 | 22 | 14 |
| 2. | Víf | 8 | 235 | 217 | 18 | 13 |
| **3.** | **H71** | **8** | **222** | **216** | **6** | **9** |
| 4. | Team K. | 7 | 200 | 198 | 2 | 7 |
| 5. | Stíf | 8 | 243 | 249 | -6 | 5 |
| 6. | Neistin | 7 | 190 | 214 | -24 | 4 |
| 7. | Kyndil | 8 | 204 | 222 | -18 | 2 |

# EGINSTUÐLAR

FAROE SHIP

Fønix

strandamáling

Eydnudeild

FØROYA TELE

PRISMA

Samverk

ADVOKATSKRIVSTOVAN

RASKA
1977

BILLUTIR

LAKKERING

LIMO

FIXA
PERSÓNBILAR | LASTBILAR | HÚSVOGNAR

Halton

SMYRIL LINE

ADVOKATFELAGIÐ

polyplast

LBF

LAIDERZ
*Fokus á ítróttavøllir & breytir*

THE BIRD | GUESTHOUSE

Januar
LØGGILT GRANNSKOÐANARVIRKI

SALMON PROTEINS

bilrokt.fo

formula

OY

SPEKT

»GOTT ER AT HAVA GÓÐAN Í RÁÐUM«



ADVOKATFELAGIÐ

LUKAS DEBESARGØTA 8 · TEL 203040 · FAX 203041 · P.O. BOX 359
FO-110 TÓRSHAVN · FAROE ISLANDS
LAWFIRM@LAWFIRM.FO
WWW.LAWFIRM.FO

PETUR EVEN DJURHUUS · JÓGVAN E. ELLEFSEN
INGI HØJGAARD · GUNN ELLEFSEN


MAGN
BURG
ARIN
magn



# VENJARA-FRÁGREIÐING GENTUR 10

Venjingarnar hjá okkara G10 byrjaðu miðskeiðis í august mánaði í ár. Genturnar venja hondbólt tríggjar ferðir um vikuna, tvær ferðir í Hoyvíkshøllini og eina ferð í fimleikarhøllini hjá Skúlanum við Løgmannabreyt.
Tað er eitt væl roynt venjaratoymi sum hevur genturnar til ymisku venjingarnar, tað eru Tróndur Joensen, Áki Mørk, Simon Olsen, Sebastian Christensen og Ári Egason Dam sum hava venjingarnar, og afturat sær hava teir nakrar av okkara røsku ungu g14 leikarum at hjálpa sær, Anna á Borg og Bjørk Maria Joensen. So tað má sigast, at genturnar eru í góðum hondum.
Tað eru umleið 35 gentur tilmeldaðar, og hesar eru fordeildar á 4 lið, sum øll spæla í hvør sínum styrkisbólki (A-D). Stórsti denturin verður lagdur á trivnað, og menning. Nakrar av gentunum hava spælt hondbólt í fleiri ár, meðan aðrar eru byrjaðar í ár, so tað er eitt vítt spenni á førleikunum hjá gentunum, og tí er tað ein stór uppgáva hjá venjarunum at skipa venjingarnar soleiðis at allar fáa nakað burturúr, men hetta er ein uppgáva sum vit meta verður væl loyst, og genturnar mennast fyri hvørja viku sum gongur.








Í G10 er tað fyrstu fer genturnar spæla dystir á heilum vølli, har man telur mál, og ein stigatalva verður førd á heimasíðuni hjá HSF. Venjararnir royna at leggja dent á menning og stuttleika frammum úrslit til dystir, men hjá fleiri av gentunum er tað sera spennandi at fylgja við í hvar á tabellini tær liggja. Í krókunum verður nógv tosað um hvar tær nú liggja eftir dystirnir í vikuskiftinum, og hetta man eisini verða sunt, so leingi tað ikki yvirskuggar menningina.
Og úrslitini eru eisini á góðari leið, B, C og D liðini hava øll vunnið og tapt nakrar dystir í ár, og liggja rímuliga væl í tabellunum. Og A-liðið hevur skúgvað alla mótstøðu til viks higartil í ár, og liggur á einum flottum 1. plássið.
Frammtíðin á okkara kvinnusíðu sær sera bjørt út, tí tað eru nakrar ótrúliga fittar, raskar og stuttligar gentur sum venja í okkara g10 árgangi, og har eru heilt víst fleiri sum eru klárar at avloysa tá Jana, Rúna, Lív, Vár,Guðrið, Marita og allar hinar á besta kvinnuliðnum leita sær uttanlanda ella ikki orka meir, um nøkur ár.







HJÁ FRÓÐA

SMYRILSVEGUR 10
TÓRSHAVN



ID.3. Býður tær vælkomnum.
Flytur teg inn í elheimin.
**Flytur teg frameftir.**

Les um prís, koyristrekki, umhvørvisroknskap og mangt annað á
www.bilasolan.fo

**Bilasølan**
**Vegurin Langi 43, 359700**



# VENJARA-FRÁGREIÐING DREINGIR 10

” We cannot always build the future for our youth, but we can build our youth for the future.” Således sagde Franklin D Roosevelt og som forening har vi en vigtig rolle med det øjemed, at skabe fundamentet til et sundt og aktivt liv. Derfor dyrkes kammerat- og fællesskabet på ligefod som de tekniske færdigheder og antal mål scoret. Til sammenligning fra sidste år er det store fællesskab vokset, da tilslutningen af spillere er steget markant. I år kan registrere over 50 medlemmer i denne årgang, og der synes stadig at dukke nye ansigter op hver uge hvilket betyder vi er hele 5 hold der drager til kamp hver anden weekend.

Til at udvikle den store talent-masse, har vi i år også nogle af de bedste hjælpetrænere i form af Bogi Hansen, Rói á Skipagøtu fra Burn-holdet, samt Jakup Egholm og Dánial Mørkøre, som trænede størstedelen af spillerne sidste år. Ikke alene er de nogle rigtig dygtige trænere, men de tager sig også tid til at spille med



børnene og viser dem nye tricks og finter som de ihærdigt forsøger at kopiere.
Jeg er sikker på, denne årgang, ligesom de mange før, nok skal få deres opblomstring og denne stille optimisme finder jeg, ikke alene når jeg ser, hvor meget de knokler for at mestre håndboldspillet indenfor de tre træningstider de har i løbet af ugen. Men lige så meget når jeg hver eneste dag ser spillerne finpudse deres færdigheder uden for træningstiden. Fremtiden ser lys ud for vores U10 drenge.



Mynd: Gudmund Helmsdal


www.laiderz.dk




SPEKT løggildir grannskoðarar Spf. ·Staravegur 17
Postsmoga 3258 · 110 Tórshavn ·Tel 34 34 34
Faks 34 34 35 · spekt@spekt.fo · www.spekt.fo

SPEKT | løggildir grannskoðarar

FAROE SHIP


OKKARA KJARNUØKI
GRANNSKOÐAN
ROKNSKAPARHJÁLP
SKATTUR
VIRKISRÁÐGEVING
BÓKHALD
MEIRVIRÐISGJALD
Skalt tú meta um framtíðina, mást tú kenna fortíðina.
Januar
LØGGILT GRANNSKOÐANARVIRKI
WWW.JANUAR.FO


Tak appina
niður her
Fyll á og
koyr víðari
effo
appin




HOTEL BRANDAN



ARTICON

Articon P/f · á Hjalla 20 · 188 Hoyvík · Tel. 350 700 · www.articon.fo




Thomas Dam Intersport
Bøgøta 1, Klaksvík
455320

Thomas Dam Intersport
Jónas Broncksgøta 21, Tórshavn
355300

Thomas Dam Intersport
Glyvravegur 38, Glyvrar
447399




**Niels Finsensgøta 5, 100, Tórshavn, 355310**
**@theathletesfoottorshavn**

# mál

Et her ella tak út við

**Máltíð til børn & vaksin**

*Salatbarr* **Kaffi** *Tvíflísar*

**Smurd rundstykkir**




**Skal tú hava bindiklubb, veitslu, tiltak ella fund?** *Vit kunnu hjálpa tær. Sig bara hvussu nógv og hvar, so koma vit, tá tað er tíð til máltíð.*

Mál, Karlamagnusarbreyt 16A, Hoyvík.
Ring ella skriva: tel. 588256, tpost christianna@mal.fo

# Frítíðin byrjar umborð




Lætt og ómakaleyst ber til at koyra bæði Danmark, Ísland og alt Evropa upp og niður, júst tá passar tær. Við egnum bili er alt nógv lættari. Pakka viðførið í bilin, koyr umborð og njót ferðina.

Tá tú ferðast við Norrönu, kanst tú byrja at halda frí, leingi áðrenn tú kemur fram til títt frítíðarstað ella summarhús. Umborð á Norrönu kanst tú halda frí, so tað stendur eftirí.

Les meira á **www.smyrilline.fo**, skriva til **booking@smyrilline.fo** ella ring **345900**

NORÐOYA SPARIKASSI

# Lán til bústaðin

Tosa við okkum um fígging



Heimlán
Bústaðarlán
Realkredittlán
Byggikreditt
Orkulán

Norðoya Sparikassi Hoyvíksvegur 67 FO-100 Tórshavn Tel. 475000 ns@ns.fo

ns.fo

FISHFACTS

www.fishfacts.com

REYNI SERVICE P/F

Umhvørvisviðurkent
ISO 14001 virki

Tórshavn: Vegurin Langi 41, Hoyvík, Tel 35 30 40
Klaksvík: Klingrugarður 3, Tel 47 30 40

HIDDENFJORD

RAISED IN THE WILD




NUDLAVIRKIÐ

hiddenfjord.com


SKORA
VIÐ
SISU
SISU


Føroya Bjór í Hoyvík
Karlamagnusarbreyt 17
Upplatingartíðir
Mánadag-Hósdag 13.00-18.00
Fríggjadag 10.00-19.00
Leygardag 10.00-16.00
Sunnudag Stongt

Leitar tú?

Leit

FINNUR JUSTINUSSEN




Brekkutún 4 | 188 Hoyvík | Tel. +298 30 88 00 | torshavn@samskip.com | www.samskip.fo



TÍTT FLUTNINGSFELAG

SAMSKIP


ANGUS
STEAKHOUSE
Kom og
royn okkara
BBQ
Spare Ribs
Bílegg borð á
angus.fo